UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Eysturkommuna
Oyran 2
512 Norðragøta
Føroyar

Tórshavn, tann 30. juni 2022
J.nr.: 22/06655-7
At tilskila í svari
Viðgjørt:
Tygara skriv:

*Góðkenningarskriv*

**Broytingar í serstøku byggisamtyktini fyri neystaøki G2 í Syðrugøtu**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Eysturkommuna í telduposti dagfestum 29. mars 2022 sent Umhvørvis- og vinnumálaráðnum uppskot til broyting í serstøku byggisamtyktini fyri neystaøki G2 í Syðrugøtu til góðkenningar.

Málið snýr seg um broytingar í serstøku byggisamtyktini fyri neystaøki G2 í Syðrugøtu. Serstaka byggisamtyktin er innskrivað sum § 15, stk. 5 í almennu byggisamtyktini fyri Eysturkommunu.

Gjørt verður ein nýggj serstøk byggisamtykt fyri neystaøki G2 í Syðrugøtu og samstundis fellur § 15, stk. 5, (serstøk byggisamtykt fyri neystaøki G2 í Syðrugøtu) burtur úr almennu byggisamtyktini fyri Eysturkommunu.

Broytingin hevur ligið frammi frá 7. februar til 3. mars 2022. Tá freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og mælir í ummæli sínum frá 30. mai 2022 til at góðkenna broytingina fyri G2 økið við hesum viðmerkingum.

*Nevndin viðmerkir, at málið kundi verið betri skipað, lýst og grundgivið. Serstaka byggisamtyktin eigur at verða skipað í økir fyri seg 1, 2 og 3 o.s.v., soleiðis at borgarin betur kann skilja, hvat er galdandi fyri hvørt øki.*

Umhvørvis- og vinnumálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir broytingarnar í serstøku byggisamtyktini fyri neystaøki G2 í Syðrugøtu sum omanfyrinevnt.

Mint verður á, at hóast ráðið nú hevur góðkent broytingarnar í byggisamtyktini fyri Eysturkommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega møguligar aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt rættaður byggisamtyktartekstur við kortskjølum við átekning frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Vegna Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Kristvør Hentze Poulsen